ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1 – 3
100 Tórshavn

19. desember 2023
Mál: 23/24634
Tygara skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-057/2023

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-57/2023 eftir tingskipanini §52a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Súsannu Bertholdsen, løgtingskvinnu, um framskundaða pensjón.

Spurningar:

1. Hvussu nógvar umsóknir um framskundaða pensjón hava verið, síðani skipanin kom í gildi 1. desembur 2019?

2. Hvussu nógvir borgarar hava fingið játtað framskundaða persón, síðani skipanin kom í gildi 1. desembur 2019?

3. Hvussu long er viðgerðartíðin fyri framskundaða pensjón?

4. Hvussu og hvar verður kunnað um møguleikan fyri framskundaðari pensjón?

Svar:

1. *Hvussu nógvar umsóknir um framskundaða pensjón hava verið, síðani skipanin kom í gildi 1. desembur 2019?*
   Higartil hava verið 60 umsóknir um framskundaða pensjón

2. *Hvussu nógvir borgarar hava fingið játtað framskundaða persón, síðani skipanin kom í gildi 1. desembur 2019?*
   Allar umsóknirnar eru játtaðar, eingin er sýtt. Hetta hongur saman við ta ráðgeving, ið verður veitt, tá persónur vendir sær til Almannaverkið, tí hann ikki longur megnar arbeiðslívið vegna aldur, sjúku o.t.

   Tey flestu, sum søkja um framskundaða, hava samband við Almannaverkið, áðrenn umsóknin verður send. Tað kann t.d. vera, tí tey ikki eru arbeiðsfør og tískil ynskja sosiala ráðgeving um møguleikar fyri hjálp, ella tey fáa sjúkradagpening ella uppihaldsveiting. Sostatt fær Almannaverkið ráðgivið teimum at søkja tað best hóskandi veitingina - pensjón ella tillagað starv.

3. *Hvussu long er viðgerðartíðin fyri framskundaða pensjón?*

Viðgerðartíðin er í miðal 141 dagar. Er tíðin drigin frá, har Almannaverkið bíðar eftir serlæknaváttanum o.l., er miðal viðgerðartíðin 88 dagar.

4. *Hvussu og hvar verður kunnað um møguleikan fyri framskundaðari pensjón?*
   Kunnað verður um framskundaða pensjón í almannapensjónslógini og á heimasíðuni hjá Almannaverkinum.

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna